DEN STILLE FEDE NIBEFESTIVAL.dk

## Fyrireikararnir væl nøgdir



Peter Møller Madsen, formaður fyri festivalnevndina í Nibe, var væl nøgdur við undirtøkuna fyri festivalinum í ár

Fyrireikararnir av Nibe Festivalinum vóru væl nøgdir við tiltakið í ár. Forsølan hjá festivalinum var svikalig, men fólk streymaðu til festivalin hóast alt.

– Vit høvdu vánaligt veður í fjør, og tað vísir seg at ávirka forsøluna árið eftir. Roskilde upplivdi nakað av tí sama í ár. Men nú tá festivalurin er, oysa vit atgongumerki út, segði Peter Møller Madsen, sum er formaður fyri festivalnevndina í Nibe.

Tað var brennandi sólskin meginpartin av tíðini í Nibe. Leygardagin var skýggjað veður, og eitt æl skolaði yvir festivalin, men veðrið var hóast alt gott og lýtt.

Millum sjey og átta túsund fólk vóru á festivalinum hvønn dagin, og tey hugnaðu sær óført við góðum tónleiki, mati og drykkjuvørum og festivalhýri annars.

## Úr London til Nibe



Steintór Rasmussen, Jóna Thomsen og Jens L. Thomsen fáa sær eitt prát í Nibe

Tónleikarin Jens L. Thomsen og dansarin Jóna Thomsen, sum bæði búgva í London, vóru við til Nibe Festivalin í ár.

Jens L. Thomsen, sum tekur útbúgving innan ljóð og tøkni í London, var ein av tónleikarunum í bólkinum hjá Høgna Lisberg, og Jóna Thomsen var komin at lurta eftir teimum og øðrum bólkum á festivalinum.

Jens er eisini høvuðsteknikari á G! Festivalinum í ár, og hann kundi tí sneyta eitt sindur eftir, hvussu teir í Nibe skipaðu síni ljóðviðurskifti.

ROSKILDE FESTIVAL

## SUPERROKKUR FRÁ KENT

Niels Uni Dam | nielsuni@sosialurin.fo

Svenski superbólkurin Kent fór á stóra appilsingula pallin á Roskilde Festivalinum stutt eftir Velvet Revolver, og vístu hvussu tað skal gerast. Bólkurin spældi sín poppkenda sveimandi rokk næstan perfekt, og konsertin var fantastisk.

Eg sá Kent spæla á Roskilde fyri 5 árum síðan, og tá var talan um ein ringan ótjekkaðan punkkendan rokkbólk. Bólkurin er mentur ófatiliga nógv. Løgini eru so øðiliga góð, og Kent spældi tey nakað so væl. Ljóðmyndin var vøkur, og svensku tekstirnir eru vakrir og vælskrivaðir. Her var talan um eina frálíka konsert upplivingi.

Løg sum "Om du var här" og "Kärleken vänter" høvdu so væl fatur í áhoyrarunum, at tú kundi ikki annað enn elska tey, og tá sangarin messandi sang "Vi skal alla engång dö" trúði eg honum.



Rani Hammershaimb Christiansen, trummuleikari í Orkestriiinum her Vestriii.

*Eg haldi at Kent var avbera gótt. Mær dámar sera væl løgini, eg eigi ikki nakað við Kent, men teir hava nøkur heilt góð løg. Ljóðið hjá Kent var eisini so ræðuliga gott, serliga í mun til Velvet Revolver, sum spældi beint áðrenn. Ljóði var nógv meira ruddiligt, og klárt.*

## ÓFEITIR FOO FIGTHERS

Niels Uni Dam | nielsuni@sosialurin.fo

Foo Figthers vóru eitt av teimum heilt stóru nøvnunum á plakatini á Roskilde Festivalinum, men teir gjørdust ikki ein av teimum stóru tónleikaupplivingunum. Sangarin Dave Grohl er fyrrverandi trummuleikari í Nirvana, og hevur langt síðan fingið sítt pláss rokksøguni. Men hann var samstundis veikasti liður í Foo Figthers hetta leygarkvøld á Roskilde.

Røddin var lítið orkumikil, og dróg hetta framførsluna niður. Bólkurin spældi annars væl og tað, sum Grohl manglaði í røddini, hevði hann í beinunum. Hann rann runt sum eitt ótt alla konsertina, og eina ferð rann hann út ímillum áskoðararnar og stóð eina løtu ljóðtorninum mitt úti millum áskoðararnar og spældi gittar.

Bólkurin hevur ein frálíkan lagaskatt, sum teir spældu nógv og gott burturúr, og áhoyrararnir vóru rættuliga væl við, men alt ov ofta misti bólkurin takið á áhoyrarunum, og fólk stóðu og smáprátaðu sína millum.Eitt av teimum stuttligaru innløgunum var tá Dave Grohl spældi "Rio" hjá Duran Duran.

Hetta var fyrstu ferð, at Grohl vitjaði festivalin síðan hann í 1992 var har við Nirvana. Konsertin fór sjálvdan ordiliga á flog, og tóktist eitt sindur long.



Áhoyrarin: Rólant av Reyni, gittarleikari í Makrel

*Konsertin var yvirraskandi, knappiliga stóð Dave Grohl beint frammanfyri mær. Eg haldi, at konsertin var feit, eitt sindur langdrigin, men góð alíkavæl. Dave Grohl er góður sangari og góður gittarleikari, men mær dámar hann betur á trummum.*

## PETER SOMMER HUGTÓK

Niels Uni Dam | nielsuni@sosialurin.fo

Danski tónasmiðurin Peter Sommer var fyrstur á Odeon pallin í leygardagin. Hetta er ein av teimum smærru pallunum. Men tey nógvu fólkini inni í teltinum og øll, sum sótu uttanfyri fingu eina jaliga, summarliga og hugnaliga løtu.

Tey vøkru og einfaldu løgini hóskaðu væl til at byrja dagin við, eftir at rokkurin var í hásæti í fríggjakvøldið. Peter Sommer hugtók, serliga vóru tað donsku útvarpsslagararnir "Tigger" og "Valbybakke", sum fingu lurtararnir við sær. Men eisini "Endnu en sommer" og "Bombesikker kærlighed" vóru syngi við løg.



Áhoyrarin: Ragnhild Ellingsgaard, summarmorgunvertinna

*Eg kendi ikki Peter Sommer áðrenn konsertina. Ein vinmaður lokkaði meg við. Hann segði, at tað var sovorðin Singer Songwriter tónleikur, og at tað var gott, og eg hugsaði hví ikki, veðrið var gott, so eg fylgdi bara við. Eg varð ótrúliga positivt yvirraskað. Eg hevði vænta okkurt í stíl við Teitur, ordiliga friðarligt og stilt, men hetta var ordiliga livandi. Sjálvt um eg sat uttanfyri í grasinum, og ikki sá pallin, so varð eg fangað av tónleikinum. Eg varð rørd á onkran hátt.*

## MIKE PATTON OG FANTÔMAS EIN LØGIN BÓLKUR

Niels Uni Dam | nielsuni@sosialurin.fo

Fyrrverandi Faith no More sangarin Mike Patton, og fýra av hansara bólkum spældu á ársins Roskilde Festivali. Fantômas er ivaleyst tann kendasti av hesum spældi eina løgna konsert á Arena pallinum.

Tónleikurin er eitt bland av rokki, jassi og larmi. Røddin hjá Patton syngur sjálvdan, men er í hægri mun eitt ljóðføri, sum ger tónar, skríggjar og skrálar. Umframt Patton, sum spælir á rødd, eru eisini bassur, slagverk og gittari við í bólkinum.

Løgini eru ikki løg í vanligari merking, men heldur ljóðmyndir, sum tónleikararnir spæla við og hugna sær við at skapa. Framførslan hjá Fantômas var góð, men hevði kanska betur egna seg til Listastevnuna enn í einum telti á Roskilde Festivalinum. Tær ferðirnar tónleikurin veruliga fekk fatur í áskoðarunum, var tá Patton sang vanligari melodiir og løgini vóru eitt sindur meira lagakend.



Áhoyrarin: Mikkjal Gaard, sangari í Sic

*Mær dámar so ótrúliga væl Mike Patton. Ongin dugir so væl at brúka røddina sum hann. Eg havi eina fløgu við Fantômas, hon er fullkomiliga horror, so tað baskar.*
*Høvuðsprojektið hjá Patton; Mr. Bungle er eisini fantastiskt. Henda konsertin minti meira um Mr. Bungle enn um Fantômas. Eg kenni Fantômas, sum løg við melodiðum heldur enn sovorðin stutt ógvuslig riff. Men hetta var ræðuliga gott.*





Burger King and Whopper are registered trademarks of the Burger King Corporation

BIG KING XXL
Stórt, skjótt og gott...
BURGER KING